# Hava avtalu við SEV

**Funningur:** Smoltstøðin Áarstøð í Funningi hevur ongar trupulleikar við at fáa vatn, hóast turkur er. Støðin hevur avtalu við Elfelagið SEV, sum annars fer við mesta av vatninum fram við Funningsfirði og har á leiðini.

Áarstøð hevur vatngoymslu oman fyri bygdina í Funningi. Men tunnlarnir hjá SEV greina seg víða, og fara við mesta vatninum á leiðini. Tó er avtala millum SEV og Áarstøð um, at manglar vatn í brunninum hjá smoltstøðini, verður veitt úr brunninum hjá SEV. Leiðing er løgd millum brunnarnar. Skipan er, sum læsir av sær sjálvum, tá brunnurin hjá Áarstøð er fullur, soleiðis at einki flýtur yvir og fer fyri einki.

Annar siga tey í Funningi, at tað tykist løgið, at vatn skal vera mangulvøra í Føroyum. Í Funningi eru tey annars frá náttúrunar hond væl útgjørd við vatni. Men nú sansar at, nú SEV hevur borað tunnlarnar.

Hvussu fjørðurin fer at hava tað, vita tey ikki rættiliga enn, siga funningsfólk. Men tað mátti farið at sansa at við iltini einaferð, nú minni vatn rennur í fjørðin, og nógv aling er, vænta tey.

# Ganga við rívu og stong

**Skúvoy:** Í Skúvoy eru fólk soleiðis umleið hálvliðug at hoyggja, frættist, tá Sosialurin tosaði við skúvoyingar í gjár. Tað hevur viðrað væl har sum aðrastaðni, og nakað væl av hoynum er fingið til høldar.

Tað er væl av fugli í Skúvoy eisini, men ættin hevur ikki verið til vildar í summar. Ov nógv eysturætt hevur verið, og hon er ikki tann rætta, siga tey í Skúvoy.

Onkur dagur hevur kortini verið, har menn hava fingið eitt sindur. Teir vóru tíggir mans uppi frá báti nú hendan dagin og fingu 700 lundar. Fjórði maðurin var eftir á bátinum. Onkur hevur verið í bakkanum og fingið einar 200 lundar, og tað meta teir hampiligt.

Í Skúvoy er tann skipan, at tann sum eigur jørð, kann fara á fleyg hvønn dag. Tað er ikki býtt á ávísar dagar, sum aðrastaðni. Fleygast kann bert millum seks á morgni og seks á kvøldi, og triðingur verður latin í landparti. Soleiðis slepst undan, at onkur kanska er óheppin og bert eigur tørn, tá eingin ætt er og sostatt ongan fugl fær yvirhøvur.

Skúvoyingar hava verið óhepnir við útróðri í summar. Um hvítusunnuna var brim nógvastaðni, og í Skúvoy gjørdi tað rættiligan skaða. Tríggir bátrar fóru illa, og tann fjórði fór fyri einki. Tað vísir, siga tey úr Skúvoy, at bátahylurin er ikki nóg góður, sum er.

Onkur hevur verið onkran túr við kalvalínu, men tað bar einki serligt til, Tó vóru teir ikki sørir. Annars hevur tað mest verið til dyrging, flotað hevur verið.

# Nokk av vatni

**Gjógv:** Við Gjógv hevur turkurin ikki havt nakra ávirkan á Smoltstøðina, siga tey av Gjáarsmolti.

Hóast turkurin hevur verið drúgvur í summar, hava tey alla tíðina havt nokk av vatni. Gjáarsmolt fær vatn úr Stórá, sum hevur runnið alla tíðina. Umframt fáa tey eisini eitt sindur av vatni úr keldum eystan fyri bygdina. Tað hevði borið til eina tíð enn, verður sagt frá Gjógv.

Men nú er líkt til, at turkurin er av. Nú er aftur farið at kennast úr honum har norðuri, siga tey. Ikki nakað áarføri, men so mikið, at tað merkist kortini.

Tá Sosialurin tosaði við Gjáarsmolt í gjár, vóru tey í ferð við at koppseta smolt, sum skal setast út í heyst. Talan er um eini 500.00 smolt, sum skulu koppsetast.

# Umvæla kirkjuna fyri milliónaupphædd

*Rættiliga umfatandi umvæling verður í løtuni gjørd í Eiðis Kirkju. Arbeiðið fer neyvan at kosta undir milliónina, sigur kirkjuráðsformaðurin*



Gólvið í Eiðis kirkju er tikið upp og skal skiftast út

Mynd: Edvard Joensen

Edvard Joensen

**Eiði:** Ein rættiliga umfatandi umvæling er í løtuni í gongd í Eiðis Kirkju. Stórur partur av gólvinum verður skiftur út. Gamalt skal umvælast og brúkast aftur. Sakristiið er broytt, og nýggj trappa er gjørd upp í tornið. Eisini skal øll kirkjan málast innan.

Eiðis Kirkja er 119 ára gomul og sostatt vorðin fornminni. Tað ber í sær, at ikki ber til at gera við kirkjuna, sum kirkjuráðið vil.

»Í grundini sleppa vit einki at gera sjálv, uttan bara at gjalda,« sigur Hans Edvard Høghamar, kirkjuráðsformaður á Eiði.

Við hesum meinar hann, at av tí, at talan er um fornminni, skal einki gerast við kirkjuna, uttan friðingarmynduleikar eru við og geva loyvi. Og tað kann eftir formansins meting vera tungt at arbeiða soleiðis.

Hans Edvard Høghamar sigur, at tað er rættiliga langt síðan, fyrireikingarnar til umvælingina byrjaðu. Kirkjan varð stongd einaferð í vár, meðan okkurt smávegis hevur verið gjørt. Men tað er ikki fyrr enn fyri heilt stuttum, at tað veruliga umfatandi arbeiðið er farið í gongd. Restin av tíðini hevur verið nýtt til tingingar og metingar um, hvussu best er at gera.

Gólvið í kirkjuni skal alt takast upp. Tað, sum brúkast kann aftur, skal eisini brúkast, hevur kirkjuráðið fingið at vita. Fornminni skilst. Sostatt roknar kirkjuráðsformaðurin við, at umleið helvtin av gamla trægólvinum verður nýtt aftur, meðan hin helvtin ikki kann brúkast.

Gólvið í skipinum er lagt við flísum eftir miðuni, meðan síðurnar báðar hava trægólv. Hans Edvard Høghamar væntar, at nýtt gólv verður lagt konufólkamegin, meðan tað gamla, sum brúkast kann aftur, verður lagt á aftur mannfólkamegin.

Eftir miðuni er flísagólv. Hesar skulu takast upp og pussast fyri síðan at verða lagdar á aftur í sama mynstri, sum tær hava ligið.

Men áðrenn gólvið kann leggjast á aftur, skal helst stoypast upp undir físarnar, soleiðis at tær ikki fara av lagi. Og undir trægólvinum verður nú grivið soleiðis, at longri verður millum undirsløgini og undirlagið. Hetta verður gjørt fyri at sleppa undan fukti, sigur Hans Edvard Høghamar, kirkjuráðsformaður á Eiði.

Tá skipið er liðugt, verður gólvið í kórinum tikið upp. Tað má helst skiftast út, alt sum tað er, metir formaðurin.

Sermerkta altartalvan í Eiðis Kirkju skal tá eisini pussast upp. Sakristiið er umvælt, og trappan millum bæði loftini ávegis upp í tornið er eisini skift út. Tá so alt , sum takast skal upp og skiftast út, er komið upp á pláss, skal øll kirkjan, sum hon er, málast innan. Úr torninum og inn í kór. Seinast, kirkjan var málað, var í 1963.

Kirkjuráðið hevur ætlanir um at fáa bygt eitt wc upp í kirkjuna. Men sum skilst á formanninum, er tað ikki so líkatil at byggja upp í ein friðaðan bygning, sum Eiðis Kirkja er. Her eru ymsar áskoðanir frá kirkjuráðnum og myndugleikunum. Men Hans Edvard Høghamar sigur, at tey hava gjørt kloakkina klára, so byggjast kann nær tað skal vera, um semja fæst um tað.

Hans Edvard Høghamar, kirkjuráðsformaður, sigur, at hetta stórarbeiðið helst fer at kosta oman fyri milliónina. Hann hevur ikki neyva kostnaðin enn, tí enn er málingaarbeiðið ikki boðið út.

Kirkjuráðið átti nakað væl av peningi, tá byrjað varð, og væntandi verður okkurt oyra at fáa í komandi tíð eisini, sigur formaðurin um fíggingina.

Kirkjan hevur, sum sagt verið stongd síðan einaferð í vár. Og Hans Edvard Høghamar sigur, at tað kann vera, at hon ikki verðurtikin í nýtslu aftur fyrr enn komandi vár. Tó vóna tey, at hon kann verða liðug til jóla.

Meðan kirkjan hevur verið stongd, hava allar kirkjuligar handlingar verið í missiónshúsinum. Tó varð konfirmatiónin í vár flutt til aðra kirkju í prestagjaldinum.

# Ala lívfisk í Hesti

*Fiskaaling hevur eina lítla alistøð í Hesti, har lívfiskur verður aldur. Annars eru arbeiðsplássini fá í bygdini*



Fiskaaling hevur lívfiskastøð í Hesti

Mynd: Edvard Joensen

Edvard Joensen

**Hestur:** Tveir mans arbeiða á alistøðini hjá Fiskaaling í Hesti. Teir ala lívfisk, sum strokin verður norðuri við Áir. Talan er um bæði laks og síl.

Av øðrum arbeiðsplássum er lítið til í Hesti. Onkur rør út. Annars fara fólk av oynni til arbeiðis, siga hestfólk.

Alistøðin hjá Partafelagnum Fiskaaling í Hesti er onnur av tveimum lívfiskastøðum, felagið hevur, sigur Símun Joensen, stjóri á Fiskaaling. Hin støðin, sum er høvuðsstøðin, er lívfiskastøðin í Skopun. Støðin í Hesti er líkasum ein trygd, um okkurt skuldi borist á í Skopun. Klók høna verpur ikki øll eggini í sama reiður, sum sagt verður.

Alistøðin í Hesti er líkasum í tveimum. Nakrir ringar liggja inni í havnini, meðan nakrir eru norðanfyri grótkastið úti í sjálvum Hestfirði. Í ringunum, sum liggja inni í Havnini, er smolt, meðan størri fiskurin er úti á firðinum.

Símun Joensen sigur, at tað ber ikki til at hava smolt úti á streymasjógvi. Roknað verður við, at fiskurin skal viga upp móti einum kilog, áðrenn hann kann fara á Fjørðin. Har rekur hálvaaðru míl, og tað klárar smoltið ikki.

Teir hava bæði laks og síl í Hesti, sigur Símun Joensen. Í innaru ringunum í Hesti ganga eini 15.000 laksasmolt og umleið 8.000 sílasmolt, meðan tað eru umleið 4.000 vaksnir fiskar av hvørjum slagnum í teimum ytru ringunum, sigur stjórin á Fiskaaling.

Símun Joensen sigur, at prísurin á sílum hevur verið góður í ár, og eftirspurningurin hevur verið nógv vaksandi. Annars er sílamarknaðurin sera svingandi sigur hann. Laksurin er nógv meira støðugur.

Fiskaaling hevur bara loyvi at ala lívfisk. So tað er eingin vanlig aling sum so til tøku í Hesti. Trý lívfiskaloyvi eru givin. Fiskaaling hevur tvey. Eitt í Skopun og eitt í Hesti, meðan Fútaklettur hevur eitt í Vágum.

Símun Joensen sigur, at Skopun og Hestur eru væl egnað støð til lívfiskaaling, tí tey eru rímiliga avbyrgd og frí fyri sjúku. Annars er tað ein trupulleiki í Hesti, at har er so lítið pláss. So illa ber til at víða nakað serligt, um tað hevði verið ynskiligt.

TRYGGINGAR-
FELAGIÐ
FØROYAR
ynskir
Vestmenningi
tillukku við
føroyameistara-
heitinum



TRYGGINGARFELAGIÐ
FØROYAR
Tryggingarfelagið fyri allar føroyingar

Sosialurin - 311820